# Karl Martin í hóslag við tey klassisku

**Rocksangarin Karl Martin Samuelsen fer um vikuskiftið at syngja við klassiskum orkestri í rygginum. Konsertir verða í Klaksvík og í Havn**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Karl Martin Samuelsen er kendur sum ein av landsins bestu rocksangarum, men um vikuskiftið fær hann eina øðrvísi uppgávu á konsertum hjá Aldubáruni.

– Eg skal syngja, so tað er ikki nógv nýtt í tí. Tað er sum hjá einum sjónleikara at fáa ein nýggjan leiklut. Hann skal framvegis spæla sjónleik, men bara í einum nýggjum leikluti. Og hetta er ein nýggjur leiklutur hjá mær, sigur Karl Martin Samuelsen.

Hann er serliga kendur sum oddamaður í rockbólkinum Hjarnar, sum í meira enn 30 ár hevur verið virkin á føroyska tónleikapallinum, og sum aftur um nakrar dagar verður at hoyra til eina konsert í Fuglafirði.

Men Karl Martin Samuelsen hevur eisini roynt at syngja og spæla annan tónleik enn rock. Hann hevur verið sangari á fleiri barnafløgum, og hann hevur eisini sungið í kóri.

– Mær dámar væl at arbeiða við einum projekti í senn. Seta meg inn í tað, fara í dýbdina við tí og royna at fáa tað besta burturúr, sigur hann.

## Fegin um nýggju uppgávuna

Soleiðis er eisini við tí nýggjastu uppgávuni hjá honum, sum er at syngja til tónleikin, ið vinmaðurin Páll Sólstein hevur skrivað til yrkingar hjá kendum føroyskum yrkjarum. Hesin tónleikurin verður spældur á konsertum, sum Aldubáran hevur í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið og í Havn sunnudagin.

– Eg kenni meg priviligeraðan at verða biðin til hesa uppgávuna og fáa møguleikan at spæla saman við so góðum og útbúnum tónleikarum. Eg eri altíð opin fyri at læra nakað nýtt, og tað havi eg eisini gjørt við hesari uppgávuni, sigur Karl Martin.

Hann hevur verið ein av teimum, sum hevur arbeitt tættast saman við Páll Sólstein um tónleik. Páll hevur spælt løgini fyri honum, fingið Karl Martin at syngja tey, og síðani arbeitt víðari við teimum.

– Eg ætlaði alla tíðina, at Karl Martin skuldi syngja sangirnar. Eg vildi hava ein góðan sangara, sum kundi syngja hesi løgini, og sum ikki endiliga var ein klassiskur sangari, sigur Páll.

– Mær hevur altíð dámt væl, tá ið tónleikastílir hava verið blandaðir saman. Sum til dømis The Beatles gjørdi við popptónleiki og klassiskum tónleiki.



*Um vikuskiftið verða tað ikki bankandi trummur og pumpandi bassur, sum Karl Martin Samuelsen skal spæla sær á. Hinvegin hevur hann góðar klassiskar tónleikarar í rygginum*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Listasavnið á havinum

**Framsýning við listarverkum, har sigling og havið eru í miðdeplinum, lat fríggjadagin upp á Listasavni Føroya. Trý donsk listarfólk sýna fram fotomyndir, standmyndir og málningar**

LIST

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjadagin lat ein framsýning um sigling og havið upp á Listasavni Føroya. Framsýningin kallast Maritim Kontekst, og tað eru trý donsk listarfólk, sum sýna fram listarverk av ymsum slagi.

Framsýningin umfatar verk eftir listafólkini Bjørn Kromann-Andersen, Marianne Thingholm og Ralf Mabillon. Verkini eru fotomyndir, standmyndir og málningar, og øll verkini hava havið og sigling sum íblástur.

Marianne Thingholm roynir seg við løttum nýmótans segldúki úr dacron og við fotomyndum av skipsmyndum, og harumframt er hon upptikin av tí skapi, sum skipsskrokkurin hevur, sum hann sæst í landi.

Ralf Mabillon er hugtikin av sjónum, sum gevur og tekur lív, og í hansara málningum hómast eisini gomul sjókort, himmal og hav.

Í standmyndunum hjá Bjørn Kromann-Andersen verður sipað til skip, togverk, stevnismyndir og skipsprýði.



*Fyri umleið tveimum ættarliðum síðan vóru havið og sigling í nógv størri mun keldur til íblástur hjá donskum listafólkum, enn tey eru í dag, men tað eru framvegis listarfólk, sum arbeiða við havinum sum íblástur*

## Havið var týðandi íblástur

Fyri umleið tveimum ættarliðum síðan vóru havið og sigling í nógv størri mun keldur til íblástur hjá donskum listafólkum, enn tey eru í dag, og tað gjørdi tað sama, um um tey arbeiddu við orðum, tónleiki, myndum ella standmyndum.

Sigling á okkara døgum fer fram umborð á skipum, sum fyri tað mesta eru bygd í fremmandum londum, og siglt verður sjáldan í danskar havnir. Hóast nógvar havnir í Danmark nú liggja tómar, og siglingin er alt verri at fáa eyga á, so ber vøksturin av frítíðarhúsum við sjógvin, stuttleikafør og tað at havnirnar verða umlagdar til stuttleikabátahavnir við marglætishúsum ella skrivstovubygningum boð um, at havið og siglingarumhvørvið framvegis hugtekur nógv fólk.

## Føroyingar og havið

Í Føroyum er støðan ein onnur, enn hon er í Danmark. Føroyingar liva framvegis nógv nærri havinum, og tað sæst eisini aftur í listini hjá nógvum týðandi føroyskum listarfólkum.

Longu tíðliga í myndlistini arbeiddu listamenn sum Christen Holm Isaksen og Jógvan Waagstein við sjólívinum sum myndevni. Mikines legði lunnar undir fatanina av, at havið var fylt av sál og ímyndum, og seinni, sum til dømis hjá Jack Kampmann, verður havnin brúkt sum miðil til at lýsa tað modernaða lívið og estetikkina í modernaða ídnaðinum.

Havið og lívið á havnalagnum, hvørt tey verða tulkað lýriskt ella dramatiskt, eru framvegis megintemu hjá listafólkunum Ingálvi av Reyni, Eyðun av Reyni, Jónu Rasmussen, Torbjørn Olsen og Olivur við Neyst.

Listasavn Føroya sigur, at tað tí er ein stór gleði fyri savnið at vera karmur um framsýningina Maritim Kontekst, og við henni vísa eitt nýtt perspektiv á ta list, sum arbeiðir við havinum og havnini.

Framsýningin Maritim Kontekst lat upp fríggjadagin 1. apríl kl. 17.00 og er opin til 1. mai.



*Listarverk av ymsum slagi verða sýnd fram, tá ið framsýningin Maritim Kontekst letur upp á Listasavninum í dag*